

Stavanger. Mynd: Christian Houge/VisitNorway

# Her sæst oljukreppan aftur á húsaprísinum

**Jógvan Hugo Gardar**

27.11.2015 - 08:54

Oljan.fo

- Tað er næstan ókeypis at læna pengar í Noregi nú, og 95 prosent av teimum arbeiðsføru koma at hava arbeiði Vit rokna við at verandi nullrentupolitikkurin kemur at halda lív í íbúðarmarknaðinum, eins og vit síggja í Svøríki, segði Terje Halvorsen, stjóri í DNB Eiendom, tá hann í gjár legði fram tøl og metingar fyri íbúðarprísin í 2015.

Vøksturin í húsaprísunum í Noregi kemur at minka í stórum pørtum av Noregi. Í Tromsø er har prísurin kemur at vaksa næstan líka nógv í 2016, sum í ár, meðan restin av landinum, við einum undantaki, kemur at fáa ein prísvøkstur sum kemur at vera um helvtina av økingini sum hevur verið í 2015. Men tað er í einum býi at talan verður um príslækking, og hon verður gerst enn meir í 2016 enn í ár. Talan er um oljubýin Stavanger, ið sum einasti

býur kemur at uppliva, eina og í ár at húsaprísurin lækkar. Lækkingin í 2016 kemur at liggja um fimm prosent, og tað kemur omaná lækkingina í ár uppá knøpp fýra prosent.

Metingin hjá DNB Eiendom vísir at eini hús sum í januar ár kostaðu fýra milliónir krónur, try koma at hava ein prís sum liggur um 3,65 milliónir krónur tá vit nærkast jólum í 2016. Talan er u meina príslækking uppá 8,7 prosent.

Tølini hjá DNB Eiendom vísa at Noreg nú merkir oljuprísIækkingina í øllum samfelagnum, men higartil er tað bara Stavanger har ein sær so týðuliga at oljuøldin ikki gevur líka nógv longur. Stavanger og Rogalands-økið er eisini har arbeiðsloysið nú veksur skjótast í Noregi.



Her sæst gongdin í húsaprísunum í Noregi í 2015 og mett gongd í 2016. Kelda. DN/DNB Eiendom